# Allir skulu koyra fyri Rógva Johansen

*Á tí›indafundi mikumorgunin var› avdúka›, at fimm súkklarar hava tiki› seg saman í eitt li›, sum kallast Team Shell, hvørs høvu›suppgáva er at hjálpa Rógva Johansen at endurvinna Statoil kring Føroyar*



*Team Shell, her avmynda aftaná tí›indafundin mikumorgunin, skal syrgja fyri, at Rógvi Johansen skal endurvinna Statoil kring Føroyar*

Mynd: Jens K. Vang

STEFAN Í SKORINI

Statoil kring Føroyar fór av bakkastokki í Klaksvík í gjár, og fyri fyrstu fer› hava fleiri súkklarar alment tiki› seg saman í eitt li›, sum vit kenna tey frá teimum stóru súkklukappingunum sum Tour de France og Giro d´Italia.

Teir føroysku fjølmi›larnir vór›u t‡sdagin bodnir til ein tí›indafund í Tjarnalág, men ikki var› greitt nærri frá, hvat hesin fundurin skuldi snúgva seg um. Ta› loyndarfulla var, at fimm súkklarar høvdu tiki› seg saman í eitt li›, har teir skulu hjálpa hvørjum ø›rum í kappingini.

## Rógvi skal vinna

Ta› er eingin loyna, at uppgáva hjá Team Shell er at syrgja fyri at Rógvi endurvinnur kappingina. Um ta› miseydnast hjá Rógva so skal tann næsti føroyingurin, Gunnar Dahl-Olsen, taka yvir ta bláu Statoil troyggjuna, sum førarin er í. Teir á Team Shell leggja dent á, at teir koyra fyrst og fremst fyri li›i› og liggja ikki í sjálvdrátti.

Í Team Shell eru savna›ir nakrir av teimum bestu súkklarunum, sum eru vi› í Statoil kring Føroyar. Hetta er gjørt fyri at binda um heilan fingur, sum teir sjálvir siga. Á henda hátt kunnu teir eisini verja seg ímóti ø›rum súkklarum, sum óalment koyra saman.

Í fjør var stø›an tann, at Bogi Kristiansen og nakrir danskir súkklarar koyrdu saman ímóti Rógva Johansen, men hann megna›i at vinna hóast ta›. Hesum vil kanska serliga Rógvi ikki vera úti fyri enn einafer›, og tí hevur hann veri› vi› til at stovna hetta li›i›.

## Gó›ir súkklarar

Í Team Shell eru umframt føroyingarnar Rógva Johansen og Gunnar Dahl-Olsen eisini tríggir danir. Teir eru Jørgen Andersen, Janus Jørgensen, sum bá›ir koyra í A-bólkinum hjá Cycling Aarhus, og Simon Borchmann. Sí›st nevndi var› mettur at vera ein av størstu hóttanunum hjá Rógva, men nú eru teir á sama li›i, so nú kann hann ísta›in gerast ein hollur stu›ul hjá Rógva. Simon Borchmann hevur ta› mest áhugaverdu fortí›ina sum súkklari, og hann hevur veri› professionellur.

Um ein kann loyva sær at tosa um nakra hóttan hjá Team Shell, so má ta› vera Johan Brend, Kenneth Gormsen úr Gladsaxe og Jens Tousgaard úr Rødovre, sum hev›i ein møguleika at vinna í fjør. Hann var tó so óheppin at ketan slitna›i, og hann misti ov nógva tí› av hesum. Hesir tríggir kunnu væntast at fara at koyra saman, sjálvt um teir ikki hava bo›a› frá hesum frammanundan.

## Eingin kapping

Vandin vi› hesum li›num er, at als eingin kapping ver›ur í, og onkur vil vera vi›, at Rógvi er kosin vinnari av Statoil kring Føroyar, longu á›renn kappingin er farin í gongd.

Hetta ver›ur tó víst aftur, og teir á Team Shell vænta, at kanska serliga Jens Tousgaard vi› teimum bá›um Gladsaxe monnunum aftanfyri seg fer at gera nógv um seg. Jens Tousgaard var sera óheppin í fjør, og hann vil óiva› vísa naka› meir hesufer›.

Føroyingarnir á Team Shell vóna, at stigi›, teir hava tiki›, ver›ur vi› til at hækka stø›i› í kappingini. Næsta ár ver›a kanska fleiri li› vi›, og ta› hev›i veri› gle›iligt.

Rógvi Johansen sigur, at teir gjarna vilja vera vi› at geva teimum ungu súkklarunum fyrimyndir, og ta› vóna teir fer at eydnast vi› hesum tiltakinum.

## Statoil kontra Shell

Ta› kann vi› fyrsta eygnakast tykjast eitt sindur provokerandi at gera eitt Shell li› til eina Statoil kapping, tí hesar fyritøkur eru kappingarneytar á teirra øki. Í fjør var eisini onkur trupulleiki vi› ø›rum stu›lum, men í ár skuldi hetta veri› nakar trupulleiki.

Á Statoil sigur Hans Waag, at ta› bara er gle›iligt, at fleiri vilja stu›la súkkling í Føroyum. Hans Waag sigur eisini, at Statoil vi› hesum hevur veri› vi› til at lyfta súkkluítróttin upp á eitt hægri stø›i, og teir bjó›a ø›rum stu›lum vælkomnum.

Statoil hevur eisini tryggja› sær, at teir tríggir, sum koma fyrst á mál, fáa blómur handa›ar, me›an teir eru í Statoil troyggjum og keppum.

Mynd: Jens K. Vang







# Herfølge misti 100 túsund

*Jákup Mikkelsen skora›i og bjarga›i einum brotssparki, tá Viborg mikukvøldi› fór úr Herfølge vi› steypinum og 100 túsund krónum*

Fyri fyrstu fer› í n‡ggja kappingarárinum var Jákup Mikkelsen at síggja á sjónvarpsskíggjanum mikukvøldi›. Sjøtul var› settur á n‡ggja kappingarári› vi› einum dysti ímillum meistarali›i› Herfølge og steypavinnararnar úr Viborg.

Spælb‡ti› var javnt, fer›in var ikki serliga høg, og neyvleikin var ikki tann, sum hann plagar at vera, tá li›ini eru í fullgó›ari venjing. Umhvørvi› var heldur ikki einum toppdysti verdugt. Einir túsund ásko›arar hugdu at, og ta› er líti›, tá hugsa› ver›ur um rómin, sum plagar at vera, tá ta› í Onglandi ver›ur sett hol á eitt n‡tt kappingarár vi› uppger› á Wembley ímillum meistarali›i› og steypavinnararnar.

Viborg vann 8–7. Eftir vanliga leiktí› stó› á jøvnum 1–1. Heine Fernandez leg›i mi›skei›is í 2. hálvleiki Viborg á odda. Hann fekk bóltin stungnan fram ímillum. Eftir mi›ásinum rann hann frá verjuspælarunum, og ein metur inni í brotsteiginum sendi hann dygst inn vi› stólparótuni til vinstru fyri seg sjálvan.

Herfølge javna›i, tá sjey minuttir vóru eftir. Tommy Schram gjørdi n‡tslu burturúr brotssparki.

Fari› var beinlei›is til brotssparkskappingina, og tá spældi Jákup Mikkelsen ikki so lítlan leiklut. Hann bjarga›i einum brotssparki og skora›i upp á eitt. Men Herfølge tapti brotssparkskappingina 7–6. Tveir í Herfølge misn‡ttu. Tann seinni var venjarin John Faxe Jensen, sum hev›i skift seg sjálvan inn á vøllin í 2. hálvleiki.

Umframt stóra steypi› fekk Viborg eitt hundra› túsund krónur. John Faxe Jensen og Jákup Mikkelsen søgdu bá›ir, at teir sóu dystin sum ein venjingardyst til superliguna. Herfølge skal spæla fyrsta landskappingardystin mikukvøldi›. Tá fáa teir vijtan av AaB.

**jh**



Mynd: Álvur Haraldsen

# KÍ á veg í venjingarlegu

*Klaksvíkingar, sum í gjárkvøldi› spældu í Europa Cup, vunnu sunnudagin venjingardyst í Haslev sannførandi*

Í gjárkvøldi› kl. 20 lokala tí›, i› er ta› sama sum klokkan seks føroyska tí›, skuldi KÍ gera burtur av sær í Europa Cup kappingini fyri meistarali›. Eftir 3–0 tapi› á Svangaskar›i fyri einari viku sí›ani var eingin møguleiki fyri, at teir skuldu vinna samanlagt. Hvussu ta› gekk, ver›ur meiri at frætta um í bla›num í morgin. Bla›i› var fari› til prentingar, á›renn dysturin var› spældur.

Dysturin var í Beograd ímóti Rey›u Stjørnuni. Klaksvíkingar fóru úr Føroyum leygardagin. Teir vóru í Keypmannahavn inntil mánadagin á middegi. Tá fóru teir til bulgarska høvu›sta›in Budapest vi› flogfari›, og sí›ani koyrdu teir í bussi til Beograd. Hagar komu teir seint mánakvøldi›. Fyrrapartin t‡sdagin vóru teir til venjingar, og t‡skvøldi› vóru teir á stóra vøllinum í jugoslaviska høvu›sta›num.

Ta› eru 20 spælarar vi› í fer›alagnum, og teir allir og Tomislav Sivic vóru á vøllinum sunnudagin. Mótstø›uli›i› var Haslev, sum spælir í seriu 2 á Sælandi. Jákup Mikkelsen b‡r í Haslev, og fyrrverandi KÍ venjarin, Jens Hvidemose, hevur havt vi› felagi› at gera.

KÍ spældi vi› einum li›i í 1. hálvleiki og einum ø›rum í 2. hálvleiki. Allir spælararnir royndu seg á vøllinum. Tá teir ikki vóru á vøllinum, vandu teir kondi. Haslev hev›i ikki nógv at bjó›a uppá. KÍ vann 5–1. Í ste›ginum var 2–0. Tomislav Sivic og Arnold Joensen skora›u málini undan ste›ginum. Í 2. hálvleiki skora›i Rógvi Jacobsen øll tr‡ málini.

Hóast Rey›a Stjørnan í gjárkvøldi› ivaleyst tók sær av løttum, og fleiri av eykamonnunum fingu høvi at royna seg, so mundi mótstø›an í hitanum kennast ivaleysa stór hjá KÍ.

Í dag fer KÍ fer›alagi›, sum telur 30 fólk, úr Beograd.



mynd: Jens K. Vang

Lei›in gongur til næststørsta b‡in í Jugoslavia. Hann eitur Subotica. Bussurin vi› klaksvíkingunum fer í dag í ein landnyr›ing. Teinurin er knappar 200 kilometrar ígjøgnum Serbia, sum ta› hevur veri› so nógv at hoyrt um tey seinastu tíggju árini.

Subotica liggur dygst nor›ur móti markinum til Ungarn. Tomislav Sivic hevur gjørt avtalur um fleiri venjingardystir, me›an KÍ er í b‡num. Klaksvíkingarnir koma aftur til Føroya 27. juli.

**jh**

## Smi›urin lá eftir

Í bla›num í gjár umrøddu vit væl eydna›a kappró›urin á vestanstevnu. Í yvirskriftini til umrø›una av kappingini millum 10–mannaførini stó› í yvirskriftini, at bátasmi›urin tordi ikki at hyggja at.

Tey, sum lósu greinina, løgdu ivaleyst til merkis, at ikki eitt or› var› nevnt um bátasmi›in. Av tekniskum ávum datt ta› broti› burtur ímillum.

Ta› snú›i seg Olaf Halfdansen, sum hevur smí›a› n‡ggja Vestmenningin. Hann var so spentur, at hann orka›i ikki at fara oman at hyggja at kappró›rinum. Men tá strí›i› var loki›, og ta› var greitt, at Vestmenningurin hev›i vunni› í Vestmanna fyri fyrstu fer› í 48 ár, var bátasmi›urin sum vera man eins fegin og allir a›rir vestmenningar. Og kanska eitt sindur fegnari og stoltari enn hinir!

Hev›i hesin stubbin veri› vi› í greinini í gjár, so hev›i yvirskriftin veri› meiri vi›komandi!

**jh**